

In Amenas. Mynd: EPA

# Statoil: Trygdin í hásæti í In Amenas

**Jógvan Hugo Gardar**

01.10.2014 - 14:02

Oljan.fo

Í gjár fekk Statoil tillutað eitt nýtt leitiøki í Algeria. Talan er um eitt 2730 ferkilometrar stórt øki í Illizi-Ghadames. Økið er á landi, og liggur stutt norðanfyri In Amenas. Í Noregi er orðaskifti heitt um virksemi hjá Statoil í landinum, orsaka av politisku støðuni í landinum og í grannalondunum.

Í samrøðu við tíðindastovuna NTB, sigur kunningarleiðarin fyri altjóða virksemi hjá Statoil, Knut Rostad, at trygdin er tað fyritøkan hugsar mest um, og ger mest við í Alegeria.

- Trygdarstøðan er krevjandi í hesum økinum, og vit meta allatíðina um støðuna, sigur Rostad.

Gassverkið í In Amenas bleiv álopið av yvirgangskroppum í januar í fjør, har 40 gíslar mistu lívið. Av hesum doyðu fimm av starvsfólkunum hjá Statoil. Statoil fór undir framleiðslu aftur í In Ameneas í september í ár.

Rostad sigur at aftaná hendingina í In Amenas hevur Statoil saman við samstarvsfeløgum gjørt nógv við at lýsa støðuna, og finna loysnir sum skulu gera tað tryggari at vera í In Amenas, og tá leitast skal eftir olju og gassi aðrastaðni í landinum.

Christian Yggeseth, greinari hjá Arctic Securities, heldur ikki at nýggja leitiloyvi fær so nógv at siga fyri Statoil í fyrstu syftu.

- Virði av virkseminum í Algeria hevur ikki so nógv at siga fyri samlaða Statoil-virksemi. Hinvegin kann ein stór kelda sum verður funnin her broyta myndina munandi, sigur hann.